Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Tórshavn, 2. oktober 2023
Journal nr.: 23/18717

Svar upp á fyrispurning frá Magnusi Rasmussen, løgtingsmanni, um góðsking og víðarivirking av laksi, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal (at svara skrivliga eftir TS § 52 a), nr. 52-028/2023

Fyrispurningur

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa avbjóðingarnar við, at arbeiðspláss eru í vanda fyri at detta niðurfyri í alivinnuni?
2. Nær kann roknast við, at hesar loysnir verða settar í verk?

Svar

Spurningur nr. 1 og 2 verða svaraðir undir einum

Undir viðgerðini á løgtingi, tá ið nýggja tøkugjaldið varð samtykt, boðaði landsstýrið frá, at tað fór at viðgera ávísar avbjóðingar, sum reistar vórðu undir viðgerðini og síðani alment.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur síðani arbeitt við hesum og lagt tað til politiska viðgerð.

Niðurstøðan verður gjørd sum skjótast.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 2. oktober 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður